# Suðuroyar Sparikassi gull verdur fyri Vágs Bóltfelag

**– Ítrótturin í Suðuroy eru verri fyri enn aðrastaðni í landinum og tí kann tað ikki yvirmetast at vit hava eina fyritøku í oynni, sum stuðlar okkum, sigur John Henrik Holm, formaður í VB**

STUÐULSAVTALA
*Áki Bertholdsen*



*Per Jacobsen, marknaðarleiðari í Suðuroyar sparikassa, vinstrumegin, og John Henrik Holm, formaður í VB, skrivaðu undir nýggja stuðulsavtalu týskvøldið. Aftanfyri fylgja áhugaðir leikarar við, frá vinstru eru teir Palli Augustinussen, Milan Kulic, Eyðun Jacobsen og Bjarni Johansen, liðskipari*

– Tað er ongin ivi um, at tað er Suðuroyar Sparikassi sum ger, at tað ber til hjá Vágs Bóltfelag at halda tað støðið, sum vit hava.

John Henrik Holm, formaður í VB, ivast onga løtu í hvønn týdning peningastovnurin í Suðuoynni hevur fýri bóltfelagið í Vági.

Og tá ið Suðuroyar Sparikassi og Vágs Bóltfelag týskvøldið skrivaðu undir nýggja stuðulsavtalu, duldi bóltfelagsformaðurin heldur ikki fyri, hvussu fegin hann er fyri sáttmálan.

– Tað skerst ikki burtur at á fíggjarliga økinum eru ítróttarfeløgini í Suðuroy nógv verri fyri enn feløgini norðanfyri, har fyritøkurnar eru bæði nógv fleiri og nógv pengasterkari enn tær eru í Suðuroynni. Tað skerst heldur ikki burtur, at feløgini í Suðuroy hava nógv størri ferðaútreiðslur enn feløgini norðanfjørðs.

– Tì eru vit ómetaliga fegin fyri at hava ein samstarvsfelaga á staðnum, sum er so áhugaður í felagnum, at hann er sinnaður at stuðla okkum so dyggiliga, at vit eru før fyri at kappast við onnur feløg í fremstu røð.

Her hugsaði hann ikki bara um 1. deild hjá monnum, men vísti á, at ungdómsliðini hjá VB vinna rættiliga nógv, eins og kvinnurnar vunnu greipina í hondbólti fyrr í ár, eftir at havba ligið heilt frammi undir í nógv ár.

Hóast VB eisini hevur nógvar aðrar, dyggar stuðlar, er tað Suðuroyar Sparikassi, sum er høvuðsstuðul hjá Vágs Bóltfelag og John Henrik Holm sigur, at tað er ikki yvir at dylja, at tað er stuðulin frá Sparikassanum, sum ger, at tað yvirhøvur ber til hjá VB at kappast ímillum tey fremstu.

– Stuðulin frá Suðuroyar Sparikassa er ein stórur partur av høvuðsgrundarlagnum undir felagnum, leggur hann afturat.

### Langt samstarv

Per Jacobsen, sum er marknaðarleiðari í Suðuroyar Sparikassa, sigur, at Sparikassin og Vágs Bóltfelag munnu vera ímillum elstu samstarvsfelagar yvirhøvur í Føroyum, tí síðani fyrst í sjeytiárunum hevur Suðuroyar Sparikassi verið stuðul hjá VB hvørt einasta ár -uttan tað eina árið.

– Stuðulssáttmálarnir hava allir verið ímillum Sparikassan og 1. deild menn, men seinni er eisini sáttmáli gjørdur við 1. deild kvinnur í hondbólti.

Men sáttmálin, sum partarnir skrivaðu undir týskvøldið er ein felagssáttmáli, sum umfatar bæði 1. deild kvinnur í hondbólti og 1. deild menn í fótbólti undir einum og tað er fyrstu ferð, at tað verður gjørt.

Upplýst verður ikki, hvussu stórur stuðulin er, men Per Jacobsen sigur, at sjálvsagt skulu báðir partar fáa gagn av sáttmálanum.

– Fyri VB merkir sáttmálin ein fíggjarligur styrkur til at reka felagið sum nútíðin krevur og har peningur fær størri og størri týdning.

Fyri Suðuroyar Sparikassa merkir sáttmálin, at hann staðfestir sítt pláss í lokalsamfelagnum og verður ein natúrligur partur í tí ungdómsarbeiði, ið eitt felag sum VB, stendur fyri. Hann sýtti heldur ikki fyri, at avtalan sjálvandi gevur Suðuroyar Sparikassa stórt lýsingavirði við teimum lýsingum, sum ítróttarfólkið hevur, bæði heima og tá ið tey ferðast kring landið. Hann legði tó afturat, at góð úrslit skapa størri áhuga hjá áskoðarum og tað ger eisini áhuga at lýsa enn størri.

So hóast landskappingin er byrjað illa hjá VB, vónaði hann, at tað fer at ganga framá.

Og tað hevði hann vónir um, tí sum hann segði: Ofta koma tey bestu úrslitini, tá ið ein minst væntar tað.

# Spurningur til Bjarna Djurholm í samband við samferðsluhavnina á Trongisvágsfirði



**Henrik Old,**
*løgtingsmaður*

Nú ið tilboðini liggja á borðinum um prís fyri gerð av samferðsluhavn á Trongisvágsfirði er tað av stórum áhuga at fáa at vita, um landsstýrið hevur tikið við stóru sparingarnar at knýta samferðsluhavnina og tunnilsgerðina Øravík - Hov saman.

Sostatt fyriliggur ein fastur prísur uppá samferðsluhavnina, og harvið liggur eisini púra fast hvar útbjóðararnir hava rokna við at tilfarið til samferðsluhavnina skal takast frá. Tað er óhugsandi at nøkur byggifyritøka kann geva ein fastan bindandi prís uttan heilt greitt at vita hvar ið alt tilfarið til havnina kann útvegast.

Tað kom greitt fram undir drúgvu viðgerðini í vinnunevndini at bara við at taka tilfarið úr tunnlinum Hov - Øravík kundi sparast 15 mió. umframt tað at munandi prísmunur var á tunnlinum, sum landsverkfrøðingurin ætlaði at gera, og tann sum fyritøkan sum gjørdi tunnilin um vestmannasund hevði í uppskoti. Har var munurin helst aðrar 15-20 mió. Og tí er av alstórum týdningi beinanvegin at fáa at vita, hvar tilfarið til samferðsluhavnina verður tikið frá.

Sum øllum kunnugt so samtykti løgtingið við 2. viðgerð við stórum meiriluta - bert ein atkvøða var ímóti - uppskotið hjá vinnunevndini um at alt tilfarið til samferðsluhavnina skuldi takast úr tunnlinum Øravík - Hov, við tí stóru sparing tað innibar. Men eftir ynski frá Tjóðveldisflokkinum, so bleiv uppskotið við 3. viðgerð broytt soleiðis at ikki alt tilfarið, men í mest møguligan mun skuldi tilfarið takast úr tunnlinum Øravík - Hov.

Tað kann væl ikki hugsast at tann eina stemman, sum var ímóti við aðru viðgerð kann hava havt so stóra ávirkan á endaligu samtyktina við 3. viðgerð, at risikoin er at lítið og einki tilfar verður tikið úr tunnlinum, sum so eisini ber í sær stóran meirkostnað fyri hesar báðar verkætlanirnar.

Eisini eigur at verða mint á, at kanningarúrslit fyriliggur um borðing millum Øravík og Fámjin, sum er ein sera stuttur, men nyttigur tunnil. Við at bora hetta strekki, sum helst kann gerast efir nøkrum vikum, kundi tilfar beinanvegin fingist til samferðsluhavnina, meðan bíða var til klárt var at bora millum Øravík og Hov.

Tí er tað av stórum áhuga fyri almenningin at fáa svar uppá henda spurning frá landsstýrismanninum í samferðslumálum Bjarna Djurholm:

*Hvar hava tær byggifyritøkur, sum hava bjóða uppá samferðsluhavnina á Trongisvágsfirði rokna við at taka tilfarið frá?*



## UTTAN ÚR HEIMI

# Feld tí hon er kvinna?



*Anneli Jæætenmæki fekk bar 63 dagar í finska forsætisráðharrastarvinum*

**Fráfarni finski forsætisráðharrin, Anneli Jæætenmæki, heldur seg ikki hava gjørt nakað skeivt. Tey, sum standa henni nær, halda, at hon varð feld, tí hon er kvinna.**

FINNLAND
*Árni Joensen*

Mikukvøldið góðkendi Tarja Halonen, forseti, umsóknina frá Anneli Jæætenmæki um at verða loyst úr forsætisráðharrastarvinum.

Kreppan, sum sambært finskum eygleiðarum er tann álvarssamasta í Finnlandi í mong ár, byrjaði, tá Anneli Jæætenmæki varð skuldsett fyri at hava sagt ósatt í Ríkisdegnum um nøkur loynilig skjøl, sum komu fram undir valstríðnum fyri trimum mánaðum síðani. Anneli Jæætenmæki avsannaði, at hon hevði fingið tey loyniligu skjølini úr uttanríkisráðnum, men mikudagin kom fram, at hetta var ikki allur sannleikin.

Sjálv heldur Anneli Jæætenmæki ikki, at hon gjørdi nakað skeivt, men hon hevði ongan annan møguleika enn at fara frá, tí sjálvt ikki hennara egnu floksfelagar í Miðflokkinum vildu styðja aftan á avdúkingina.

Maud Olofsson, sum er formaður í svenska Miðflokkinum, heldur, at á tí politiska pallinum í Finnlandi eru tað mong, sum fegin vildu sleppa at leggja fót fyri forsætisráðharran. Tað er óvanligt, at ein kvinna kemur so langt í finskum politikki, har menninir hava at kalla alt at siga. Tað er einki at ivast í, at mong hava verið ímóti henni, og tað fekk hon nú at kenna, sigur Maud Olofsson.

Tann 48 ára gamla Anneli Jæætenmæki er tann fyrsta kvinnan, sum hevur verið finskur forsætisráðharri. Men hon fekk bara 63 dagar í starvinum.

# Stólarnir í flogførum kunnu avdúka yvirgangsmenn

**Ein fyritøka í Bretlandi er í ferð við at gera eitt serlig slag av stólum til ferðamannaflogfør. Stólarnir skulu eftir ætlanini avdúka møguligar yvirgangsmenn.**

-Vagar tower. Hetta er Speedbird 770. Stólur nummar 26B vísir eitt óróligt ferðafólk, sum sveittar. Vit halda, at vit hava ein yvirgangsmann umborð og biðja um loyvi at neyðlenda.

Hetta ljóðar kanska sum eitt brot úr einum óhugnaligum framtíðarfilmi, men sambært bretsku fyritøkuni QinetiQ er tað als ikki ómøguligt at gera flogfarastólar, sum kunnu avdúka møguligar yvirgangsmenn millum ferðafólkini.

Granskarar hjá fyritøkuni hava gjørt ein flogfarastól, sum við trýstmátarum og aðrari útgerð kann siga ein heilan hóp um ferðafólkini. Eitt nú kunnu starvsfólkini í flogfarinum síggja, um ferðafólk sveitta, hvussu heit tey eru, og um tey eru rólig ella ikki.

Bretska fyritøkan roknar við, at teir fyrstu stólarnir av hesum slagnum kunnu setast í flogfør um eitt ár.

## Leita eftir stolnum flogfari

USA og fleiri lond í Afrika leita eftir einum Boeing 727 ferðamannaflogfari, sum varð stolið í Angola í síðsta mánað. Amerikanarar og aðrir stúra fyri, at yvirgangsmenn kunnu hava ætlanir um at nýta flogfarið í einari atsókn.

Tær fyrstu gitingarnar søgdu, at eitt stríð um pengar var orsøkin til, at flogfarið varð stolið, men sambært blaðnum Washington Post stúrir fregnartænastan CIA fyri, at yvirgangsmenn ætla at nýta flogfarið í einum álopi á onkran afrikanskan bý eins og í álopinum á World Trade Center í New York.

Tað 28 ára gamla flogfarið hevði staðið á einum flogvølli í Angola í eitt ár, tá tað brádliga hvarv. Amerikanska flogfelagið American Airlines hevur átt flogfarið, men seinastu árini hevur tað flogið leiguferðir fyri eitt felag í Miami. Amerikanskir fylgisveinar hava tikið myndir av flogvallum um allan heim í royndini at finna flogfarið, men higartil uttan úrslit.

## Vinstravongurin skal framat

Al Gore, sum var varaforseti hjá Bill Clinton, og sum royndi at gerast amerikanskur forseti fyri trimum árum síðani, roynir nú at stovna eina nýggja útvarps- og sjónvarpsrás, har vinstrasinnaðar kreftir í USA skulu sleppa til orðanna.

Sambært tíðarritinum Time heldur Al Gore, at tær republikansku kreftirnar í USA hava alt ov stórt vald á landsins loftmiðlum. Hugtakið "frælslyndi" skal fáa rúmar ræsur á teirri nýggju rásini. Í USA verður hetta orðið vanliga nýtt um tað, sum hesumegin Atlantshavið verður nevnt radikalt ella vinstrasinnað.

Sambært Time kannar Al Gore í løtuni møguleikarnar fyri at fáa fígging til ta nýggju útvarps- og sjónvarpsrásina. Al Gore er sjálvur fyrrverandi tíðindamaður.

## Finst at stjórnini

Fyrrverandi CIA-stjórin Stansfield Turner telist nú eisini millum teir amerikanarar, sum halda, at stjórnin hjá George W. Bush, forseta gjørdi alt ov nógv av, tá hon umrøddi hópoyðingarvápnini hjá Irak.

- Eg eri sannførdur um, at teir gjørdu alt ov nógv av, annaðhvørt tí teir høvdu fingið skeivar upplýsingar, ella tí upplýsingarnar vórðu tulkaðar skeivt. Í øllum førum varð alt ov nógv gjørt burtur úr hópoyðingarvápnunum, um tey yvirhøvur eru til, sigur Stansfield Turner.

Hann var stjóri í CIA frá 1977 til 1981, og tað hevur ikki verið siðvenja í USA, at fyrrverandi stjórar í fregnartænastuni finnast at myndugleikunum.

## Máttmikil skrivari tikin

Amerikansku hermenninir hava tikið ein av næstu medarbeiðarunum hjá Saddam Hussein.

Talan er um generalin Abid Hamid Mahmud, sum sambært amerikanska verjumálaráðnum var høgra hond hjá Saddam Hussein, og hann er tann hægsti av teimum iraksku leiðarunum, sum er tikin síðani kríggið. Alment var generalurin skrivari hjá fyrrverandi forsetanum, men amerikanarar vilja vera við, at hann hevði eisini ábyrgdina av trygd forsetans.

Bretskar fregnartænastukeldur siga, at Abid Hamid Mahmud var eisini leiðari fyri iraksku fregnartænastuni, og at hann hevði stóra ávirkan á herleiðsluna og trygdartænastuna. Bretar vilja eisini vera við, at generalurin hevði heimild til at ógilda samtyktir hjá stjórnini í Bagdad.